# - Nú kann eisini eg lesa føroyskt

**Nýggja teldutalan er ein ótrúlig hjálp hjá teimum blindu. – Hetta er ein stórur dagur fyri okkum, sigur Uni Rasmussen, ið gjørdist blindur 21 ára gamal.**

TELDUTALA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Uni Rasmussen (vm.) og Sjúrður Gullbein fyrireika ta stóru framløguna. Nú kann eisini Uni eisini "lesa" tey føroysku bløðini*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Norðurlandahúsið:** Klokkan er farin av 12. Við eina teldu í Klingruni sita tveir mans, Sjúrður Gullbein og Uni Rasmussen.

Teir royna at fáa telduna at gera tað, teir ynskja: At kunna lesa upp ein vanligan tekst í Word og at lesa upp ein teldupost, sum Uni hevur fingið.

Tað gongur ikki heilt eftir ætlan, tí nú lesur teldan bara upp úr teldupostinum. Teir baksast eina løtu aftrat, og nú riggar umsíðir.

Og tað er vist eisini tíð uppá, tí minni enn tveir tímar seinni skal tann føroyska teldutalan standa sína roynd.

Sjúrður Gullbein hevur staðið fyri tí málsliga og tøkniliga arbeiðinum, og Uni Rasmussen er ein teirra, sum fær gagn av hesum arbeiðinum.

Kl. 14 í gjár varð nevniliga henda verkætlanin løgd fram fyri almenningin. Og saman við henni ein onnur verkætlan um eitt teldutøkt føroyskt tekstasavn.

- Jú, hetta er ein ótrúlig hjálp, og ein stórur dagur fyri okkum, sigur Uni, sum hevur verið blindur tey seinastu 15 árini.

## Gott og rætt mál

Tað er ikki smávegis brøgd, ið henda teldutalan kann fremja.

Uni hevur júst fingið ein teldupost sum eina roynd, og nú lesur teldan brot úr brævinum:

"Eg-dugi-at-lesa-tað-mesta-sum-er-skrivað-á-føroyskum", ljóðar úr telduni.

Upplesturin er týðiligur og greiður, og eingin vandi er fyri, at tann ið lurtar ikki skal fáa alt við, tí lesiferðin er hóskandi.

Uni og Sjúrður brosa við, tí nú eru teir komnir eitt stig víðari í fyrireikingunum.

Men teldan dugir eisini at lesa upp á føroyskum, hóast talan ikki er um gott føroyskt mál.

"Eg dugi eisini at lesa forskjelligt, sum ikki er direkta føroyskt – for eksempil Prix Føroyar", lesur Sjúrður upp umvegis telduna.

## Eingin umbering

Sjálvur er Uni sera fegin um hesa føroysku teldutaluna.

- Nú kann eg lesa føroyskar tekstir, og kann eisini lesa Sosialin av internetinum.

- Og hvør veit – kanska eg nú fari at lesa onkrar føroyskar bøkur. Eg havi ongatíð verið nakar lesihestur, men nú er so eingin umbering fyri at lata vera, sigur Uni.

Frammanundan hevur hann havt henda møguleikan, men tá á øðrum málum. At tað nú er á føroyskum fer at lætta nógv um hjá honum.

- Nú fari eg eisini at tíma at lurta eftir longri tekstum, tí teir eru á føroyskum, sigur Uni, sum einaferð í framtíðini fer at kunna fáa smsboð upplisin á sama hátt.

# Tvær føroyskar verkætlanir

## Føroysk teldutala

Ein ektað føroysk verkætlan innan teldutalu, sum hevur vakt ans í Norðurlondum.

Soleiðis kann ein í stuttum lýsa ta verkætlanina, sum seinnapartin í gjár varð løgd alment fram í Norðurlandahúsinum.

Her er talan um eitt forrit, sum kann lesa føroyskan tekst, og sum aftur kann virka sum eitt hjálpitól hjá blindum og lesitarnaðum.

Við teldutaluni kunnu hesi fólkini sjálvstøðugt ogna sær vitan av Alnótini og annars samskifta við onnur á føroyskum skrivtmáli.

Samstundis sum ein hevur ment hesa loysnina, hevur henda skapt grundarlag fyri øðrum KT-loysnum, har talan er um at samskifta frá teksti til talu.

Fyri málsliga og tøkniliga arbeiðinum hava staðið Sjúrður Gullbein frá Føroya Blindastovni, Petur Helgason frá Universitetinum í Uppsala og Kjell Gustafson frá svensku fyritøkuni Acapela Group. Leiðari fyri verkætlanini, sum byrjaði fyri fimm árum síðani, er Karin Kass frá Blindastovninum.

Høvuðsstuðul hevur verið Nordisk Sprogteknologisk Forskningsprogram, stytt NorFa.

# Føroyskt tekstasavn

Samstundis við framløguna av føroysku teldutaluni varð eisini ein onnur føroysk verkverkætlan løgd fram við heitinum "Teldutøkt føroyskt tekstasavn".

Tað er 50 ára gamla, Kirsti Hansen úr Havn, sum starvast sum lektari á Gøteborgs Universitet sum hevur samskipað hetta, og hevur eisini sjálv ment eitt elektroniskt tekstasavn, sum fevnir um árgang 1998 av Dimmalætting.

Hetta tekstasavnið er ein virðismikil fongur í øllum sløgum av málsligari greining. Her verður m.a. hugsað um tíddargreining av úrvaldum orðum, setningafrøði, mállæru og kanningar av hevdbundnum orðingum. Við dømum verður víst, hvussu tekstasavnið kann fremja áhuga, tilvit og gransking í føroyskum máli.

Í fjør varð ein verkætlan, sum miðaði eftir at marka eina ávísa nøgd av teldutøkum teksti, framd á Føroyamálsdeildini.

Endmálið við arbeiðinum er at gera eitt tekstasavn, sum er markað við málfrøðiligum upplýsingum, eins og gjørdur er ein orðalisti út frá leitiorðum og bendingarupplýsingum í føroyskari orðabók.

Eitt slíkt markað tekstasavn er ein fyritreyt fyri at koma longri í samband við telduforirit, sum kunnu viðgera føroyskt mál. Við dømum verður víst, hvussu hetta tekstasavnið kann fremja áhuga, tilvit og gransking í føroyska málinum.

Heini Justinussen hevur staðið fyri tí tøkniliga partinum av arbeiðinum og Zakaris Svabo Hansen og Mortan Vang hava tikið sær av tí málfrøðiliga partinum. Granskingarráð fíggjaði verkætlanina.




*Eitt spennandi evni í granskingini hjá Kirsti Hansen er orðið "starvsfólk". Er orðið kallkyn ella er tað kvennkyn – tað veldst alt um, ein hugsar málsliga ella kynsliga*

# - Ektað føroyskt til allan heimin

**- Henda føroyska verkætlanin vísir, at sjálvt smá máløki kunnu koma langt í tøkniligu menningini, eisini hjá teimum blindu, sigur danin Henrik Holmboe**

MÁLTØKNI
*Snorri Brend*

- Ein blindur føroyingur eigur at fáa eins góða hjálp og ein blindur í øðrum londum.

- Hetta er snøgt sagt eitt moralskt krav, sigur Henrik Holmboe, sum er programkoordinator hjá Norfa.

Fyri honum er eingin ivi um, at tey blindu hava krav um at fá ta hjálp, teimum er tørvur á. Og tá ein hevur ta støðuna, so letur ein ikki marknaðarkreftirnar ráða.

- Í slíkum førum spyr ein ikki um pening, men heldur um menniskjansliga verdugheit, sum hann tekur til.

Sjálvur fegnast Henrik Holmboe um tað arbeiðið, sum er gjørt við at menna hesa føroysku teldutaluna.

- Vit eiga ta tøkniligu útgerðina. Hví ikki lata tey blindu fáa gagn av henni?, spyr hann, og dugir bara at síggja fyrimunir í hesi menningini.

## 200 tungumál

Henda verkætlanin hevur eisini vakt ans í ST-stovninum UNESCO. Í samband við framløguna í gjár var ein umboðsmaður teirra, Paul Hector komin til landið fyri at vera við í hesum.

Teir báðir, Paul og Henrik hittust fyri trimum árum síðani á eini ráðstevnu í Berlin, og tosaðu tá m.a. um hesa føroysku verkætlanina.

Teir vóru samdir um, at hetta var ein so mikið áhugaverd ætlan, at hon mátti koma øðrum fólkasløgum til gagns.

- Hetta er jú ein føroysk verkætlan, sum tit kunnu koma langt við - eisini langt út í heimin við.

- Tá tit, sum eru eitt so avmarkað máløki kunnu menna eina slíka verkætlan sjálvi, so eiga eisini onnur øki at kunna gera tað sama, sigur Henrik Holboe.

Hesum sama er Paul Hector samdur við honum í. Hann er sjálvur úr Etiopia, har tey hava eini 200 ymisk mál, harav fleiri teirra eru rættiliga smá.

- Hetta arbeiðið, sum tit hava gjørt, er avgjørt við til at geva okkum íblástur til líknandi verkætlanir í øðrum londum, sigur Paul.